# Jógvan á Sýnini telgdi skortin

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og um middagsleitið regn. Seinnapartin minni vindur av suðri og yvirhøvur turt. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fleyr til gul av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar. Um kvøldið frískar hann vindin av landsynningi. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og eystri og regn av og á. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av eystri, sunnudagin veksur hann vindin til hvassan vind Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 4 og 8 stig.

FORNMINNI

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Skorturin á síðu tvey í Sosialinum týsdagin, ið er ímyndin av eini heiðursløn, ið verður latið til Ársins Herðaklapp, ein viðurkenning, ið Leikpallur Føroya fer at lata fólki, ið gera serstakt avrik innan sjónleik í Føroyum, er evnaður til av Jógvan á Sýnini í Oyndarfirði. Gekkaskortin kendi elsti maður í Oyndarfirði Andrias í Tarti, ið er 93 ára gamal. tá vit ringdu til hann mánadagin.

– Tað er Jógvan á Sýnini, sum hevur evnað gekkaskortin til. Eg veit ikki nær hann hevur gjørt hann, men eg minnist ikki, at nakar gjørdi gekkaskortar í Oyndarfirði, tá eg var smádrongur, og eftir at eg vaks til. sigur Andrias í Tarti.

Jógvan á Sýnini doyði um leið 1950, tá var hann um 80 ára gamal, so hann hevur helst evnað skortin til, tá hann var ungur, í seinni helvt av 19. øld, sigur Andrias í Tarti.

– Eg minnist eisini, at ein gekkaskortur var til í Garðshorni, tá eg var smádrongur. Tað vóru vaksnir menn sum gingu grýlu í Oyndarfirði og eg minnist, at teir vøru øgiliga ljótir. Teir gingu hús úr húsi sum grýla, men eg minnist einki til, at teir fingur góðgæti, sum í dag. Tá vóru so ringar tíðir, at ongin hevði nakað at geva. Teir nýtti ikki bara gekkaskortar úr timbri. Roð var eisini nýtt og so vóru teir klæddir í spjørrum og ullalagdum. Øgiligar vóru grýlurnar og tær gingu ikki bara føstulávints mánadag, tær gingu fleiri dagar í føstu, sigur Andrias í Tarti.

Jógvan á Sýnini var tiltikin handaligur maður. Hann var bátasmiðjur og gamal drongur og hann smíðaði nógvar bátar. Zacharis undir Steininum í Oyndarfirð og Jóan Sofus plagdu eisini at ganga grýlu í fyrru helvt av seinstu øld.



*Skorturin, sum Andrias Weihe av Selatræ fekk við sær úr Oyndarfirði í 1931*

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷11 |
| Nuuk | „5 |
| Qaqortoq | ÷4 |
| Ammassalik | ÷11 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | ÷3 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 6 |
| Tromsø | ÷3 |
| Bergen | 0 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 1 |
| Helsinki | ÷3 |
| Moskva | ÷3 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | 1 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 4 |
| Paris | 6 |
| Madrid | 13 |
| Róm | – |
| Malorca | 21 |
| Athen | 19 |
| Malta | 21 |
| Tunis | 27 |
| Beijing | 2 |
| New Dehli | 25 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 24 |
| Sydney | – |
| New York | 0 |
| Miami | 18 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | 14 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 24 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt djúpt lágtrýst, 959 hPa. yvir Atlantshavinum á 51N-24V fer spakuliga vestureftir og brúgvalagið haðani fer um Føroyar mikudagin.




Eitt djúpt lágtrýst í landsynning sunnan úr Íslandi stendur mestsum í stað og grynnist.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 05/03 kl. 06⁰⁰–06/03 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 4,2°
Minsti hiti máldur í mars: ÷8,7° Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 05/03 kl. 06⁰⁰–06/03 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mars: 15,6 mm

Sig tað uttan rokning




petur & petur • 320870

Føroya Tele kann nú bjóða tær eina heilt nýggja tænastu til tína GSM fartelefon, ið kallast Føroya Teletíð.

*Kom inn í eina av Telebúðunum og hoyr meira um, hvussu tú sleppur undan telefonrokningunum...*

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • www.tele.fo

fík

## VESTFALLSKYRRINDI

3. mars: Fyrra kvarter
8. mars: Mánin næstur jørðini
9. mars: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. mar | 04.25 | 16.52 | 03.25 | 15.52 | 03.40 | 16.07 | 06.25 | 18.52 | 07.25 | 19.52 | 02.40 | 15.07 | 01.40 | 14.07 | 04.40 | 17.07 | 05.40 | 18.07 | 04.10 | 16.37 | 05.25 | 17.52 |
| 8. mar | 05.20 | 17.45 | 04.20 | 16.45 | 04.35 | 17.00 | 07.20 | 19.45 | 08.20 | 20.45 | 03.35 | 16.00 | 02.35 | 15.00 | 05.35 | 18.00 | 06.35 | 19.00 | 05.05 | 17.30 | 06.20 | 18.45 |
| 9. mar | 06.10 | 18.35 | 05.10 | 17.35 | 05.25 | 17.50 | 08.10 | 20.35 | 09.10 | 21.35 | 04.25 | 16.50 | 03.25 | 15.50 | 06.25 | 18.50 | 07.25 | 19.50 | 05.55 | 18.20 | 07.10 | 19.35 |
| 10. mar | 07.01 | 19.26 | 06.01 | 18.26 | 06.16 | 18.41 | 09.01 | 21.26 | 10.01 | 22.26 | 05.16 | 17.41 | 04.16 | 16.41 | 07.16 | 19.41 | 08.16 | 20.41 | 06.46 | 19.11 | 08.01 | 20.26 |